MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Leiðari til Yrkisdepilin

## Vilt tú verða við til at styrkja og menna yrkisútbúgvingarnar?
## Hevur tú visjónir, hug og hegni, so er tú leiðarin, ið vit leita eftir

Mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum og ágrýtnum leiðara til Yrkisdepilin.

Høvuðsuppgávan hjá leiðaranum er at vera skrivari hjá Yrkisútbúgvingarráðnum og fyrisitingarleiðari í Yrkisdeplinum.

**Uppgávurnar eru m.a.**
Skrivari hjá Yrkisútbúgvingarráðnum:

- at fyrireika mál til ráðsfundir og avgreiða ráðsmál
- at vera skrivari hjá ráðnum og bólkum, ið ráðið setir
- at fyriskipa menningarátøk hjá ráðnum
- at samskifta/samstarvið við myndugleikar
- felagsskapir, virki og stovnar

Fyrisitingarleiðari í Yrkisdeplinum:

- at hava fyrisitingarligu leiðsluna í deplinum
- at hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni og rakstrar og menningaruppgávum
- at gera uppskot til fíggjarætlanir fyri depilin
- at tryggja, at depilin verður rikin so skilagott sum til ber
- at tryggja ein góðan starvsfólka- og menningarpolitikk
- at fyrisita avvarðandi lógir á yrkisútbúgvingarøkinum umframt lóg um førleikameting
- at hava yvirskipaða ábyrgd av próvtøkum í almennum lærugreinum í yrkisnámi

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjari m.a.:

- hevur útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving
- hevur hug og hegni at leiða, er sjónlig/ur í leiðarastarvinum, og dugir væl at lýsa sjónarmið fyri øðrum
- er tænastusinnaður, fyrikomandi og hevur góð evni og vilja til at samstarva
- hevur førleika at menna samstarvið við vinnulívið og áhugafelagsskapir
- hevur áhugað fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir
- hevur skil fyri fíggjarstýring og hevur góðar fyrisitingarligar førleikar

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við sjálvstøðugum uppgávum og við nógvum samskifti við **vinnuna,** skúlar, stovnar og skúla- og stovnsleiðslur. Arbeiðið er á einum høgum fakligum støði, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið er sáttmálasett og lønt í 36. lønarflokki sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag landsins uttan tó at vera tænastumannastarv. Lønin er kr. 44.147,22 umframt 15% í eftirlønargjaldi. Starvið verður lýst til setanar frá 1. januar 2018 ella skjótast møguligt eftir tað.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skal sendast til:
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin **10. november 2017**.
Umsøkjarar, sum ynskja fleiri upplýsingar, kunnu ringja til Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á tlf. 555010.

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita málsøkini, útbúgving, gransking og mentan, herundir eisini dagstovnaøkið, kirkjumál og onnur trúarsamfeløg, loftmiðlar, ítrótt og annað frítíðarvirksemi.*
***Yrkisdepilin** er fyrisiting, sum heldur til í Mentamálaráðnum. Yrkisdepilin umsitur yrkisútbúgvingar- og arbeiðsmarknaðarmál, herundir at vera avgreiðsluskrivstova hjá Yrkisútbúgvingarráðnum og yrkisnevndini. Harumframt umsitur Yrkisdepilin ymsar uppgávur undir Mentamálaráðnum - í høvuðsheitum uppgávur, sum hava tilknýti til yrkis- og arbeiðsmarknaðarútbúgvingar. Í Yrkisdeplinum starvast 4 starvsfólk. Sí www.yrkisdepilin.fo*